lívið framúr kappingarevnir í hesum londum.

Peter Bofinger hevur eisini tað sjónarmiðið, et Europeiski Centralankin, ECB, skal leggja uppí valutahaldilin fyri á tann hátt at forða fyri at heimsvaluta nr eitt og tvey, Dollar og Euro, svinga alt ov nógv. Hann sigur at bankin skal royna stabilisera euro'na á einum passaliga lágum støði, og ikki bara lata dollar falla og falla og at enda kanska skrædla. Sum er í løtuni vilja hvørki amerikanski Federal Reserve Bank ella ECB leggja uppá og stalilisera valutamarknaðin.

### Fer oljuprísurin uppá 80$ fyri tunnina?

Blaðið *Neue Zürcher Zeitung* í Schweiz viðgjørdi eftirspurning og prísin á olju í grein tann 12-03-05.Høvuðsniðurstøðan var, at eftirspurningurin fer í ár at hækka við 2-3 %. Tað ljóðar kanska ikki av nógvum, men problemið er, at tey oljuframleiðandi londini, bæði í og uttanfyri OPEC, hava ilt við at fylgja við eftirspurninginum. Tann stóri framleiðsluvøksturin bæði í USA og Kina slúkar óvæntaðar stórar nøgdir av olju. Fyrr var ein framleiðslukapacitetur, sum var til taks. Men nú gongur oljupumpingin á tambi. Í hesi meting eru bæði OPEC og IEA (International Energy Agency) samd. Oljuprísurin, sum hesar dagarnar er 53-54 $ fyri tunnuna, kann tí fara heilt uppí 80$, sigur NZZ.

Búskaparfrøðingar hava verið trekir at góðtaka henda møguleika (ella ræðuleika?), men eru nú farnir at gera framskrivingar við prísum á leið mitt ímillum, ella 60-65$ fyri tunnuna.

### Føroyski fiskiflotin?

Hvønn týdning hetta kann fara at fáa fyri føroyska fiskiflotan, kunnu reiðarar og aðrir helst vurdera nógv betri enn eg. So komi tit við einum boði uppá eini framskriving uppá rentabilitet, sum byggir á ein oljuprís uppá 60-70 $ tunnuna!

Δ



*Hóast búskaparligu afturgongdina, so ber Føroya Sparikassi ongan ótta fyri føroyska búskapinum*

# Sterkur búskapur

**Sparikassin staðfestir, at hóast búskaparliga lágkonjukturin í Føroyum, so er talan um ein sterkan búskap**

BÚSKAPUR
*Jákup Mørk*

Hetta framgongur av ársfrágreiðing bankans, har tey millum annað hava nýtt tríggjar búskaparfrágreiðingar til at greina støðuna í føroyska búskapinum.

- Tað, sum serliga ávirkar búskapin, er niðurgongdin í fleiri pørtum av fiskivinnuni og í alivinnuni. T.d. hava upsa- og hýsuprísirnir verið lækkandi, og tí er úrtøkan til manning og reiðarí farin sama veg. Somuleiðis hevur fiskivinnan á landi verið merkt av versnandi kappingarføri, ið sæst aftur í eini øking í útflutninginum av óvirkaðum fiski.

- Versnandi gongdin í fiskivinnuni kemst millum annað av lækkandi dollaranum, eini herdari kapping frá láglønarlondum í Eysturevropa og Fjareystri, og smáfallandi støddum í fiskiveiðuni undir Føroyum. Samstundis hevur alivinnan verið fyri eini sera ógvusligari minking í virkseminum vegna lækkandi marknaðarprísir og herviliga sjúkustøðu.

Tilsamamans, staðfestir Sparikassin, varð talan um eitt fall í lønarútgjaldingum innan tilfeingisvinnuna upp á 8,5%

Hóast kanska døpru útlitini, so meta tey í bankanum ikki, at nøkur orsøk er at missa mótið. Sagt verður, at føroyski búskapurin er grundleggjandi sunnur og sterkur. Privati sektorurin er fíggjarliga væl fyri, eins og tann almenni parturin er sera væl konsolideraður. Nakað sum ger tað møguligt at halda aktivitetinum á einum jøvnum støði hóast búskaparligu sveiggini.

### Lítil almenn skuld

Tá tosað verður um almennu skuldina, staðfestir Sparikassin eisini, at føroyski landskassin stendur seg heilt væl í so máta. Nettoskuldin hjá Landskassanum er einar 2 mia kr., sum svara til 20% av BTÚ. Til sammetingar verður nevnt, at danski statskassi hevur eina skuld upp á 50%, tann amerikanski upp á 65%, meðan miðaltalið fyri ES-londini er ein almenn skuld, sum svarar til 74% av BTÚ.

Hartil skal eisini havast í huga, at landið eigur partabrøv, sum svarað til eini 4 mia kr., og at nettoognin hjá landskassanum sostatt er 2 mia kr.

At enda verður tó staðfest, tað framhaldandi skal gerast eitt støðugt arbeiði fyri at halda føroysku samfelagshjólunum malandi.

- Tað er tó framvegis ein avbjóðing fyri føroyska samfelagið at skapa framleiðslu, sum ikki byggir á fiskatilfeingi ella annað náttúrubundið tilfeingi.

- Sum frá líðir ber heldur ikki til at hava varandi undirskot á fíggjarlógini, og tí má tað almenna fáa nýggjar inntøkur til vega ella skarva av útreiðslunum. Týdningarmikið er, at almennu stovnarnir altíð hava røttu tilskundanina til at effektivisera, eitt nú við at taka nýggjastu tøknina í brúk.

# Gott ár hjá Kaupthing

**2004 varð besta árið hjá Kaupthing Føroyar higartil**

Hetta sigur felagið í tíðindaskrivi, sum varð sent miðlunum mánadagin.

Úrslitið áðrenn skatt var 5.272 tkr., meðan úrslitið eftir skatt var 4.236 tkr. Hetta svarar til eina renting av eginpeninginum á 32%.

Úrslitið av fíggjarpostum gjørdist 16.382 tkr. - ein hækking á 40% í mun til undanfarna ár. Samlaðu útreiðslurnar vóru 11.410 tkr. Tað er ein hækking á 21% í mun til 2003.

Fíggjarstøðan javnvigar við 21.053 tkr. Við ársenda 2004 var eginognin 17.615 tkr. og solvensurin var 119% í mun til minstakravið, sum er 8%.

- 2004 royndist væl og vit eru nøgd við úrslitið, men vit hava ætlanir um at víðka virksemi okkara meira og at náa enn betur úrslitum, sigur Peter Holm, stjóri.



*Kaupthing Føroyar upplivdi sítt higartil besta roknskaparár í fjør*

Fyri lánsbrævaeigarar gjørdist 2004 nøktandi, og eisini partabrøv, serliga norðurlendsk, stóðu seg væl í 2004, annað ári á rað. Ognirnar, sum Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F umsitir fyri føroyskar kundar eru vaksnar við umleið 10% í 2004. Felagið umsitur ognir fyri umleið 1,2 milliardir kr.

Eitt munandi íkast til raksturin hjá Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F í 2004 var vinnutænasta. Í 2004 hevur Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F millum annað verið ráðgevi í sambandi við munandi keyp av fyritøkum. Eisini hevur Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F skipað fyri størri kapitalhækkingum.

Í mai 2004 byrjaði Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F at bjóða fram útlán til føroyskar fyritøkur. Hetta hevur gingið væl. Við ársenda 2004 hevði Kaupthing-samtakið útlán fyri umleið 500 milliónir kr. í Føroyum.

Aðalfundurin í Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F var hildin 8. mars 2005 og á fundinum varð nevndin broytt nakað. Í nevndini sita nú: Sigurður Einarsson, formaður, Jógvan Páll Lassen, Johnie Brøgger og Anfinnur Olsen.